# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Robert Mugabe, forseti. pínir sítt fólk og kúgar andstøðuna, og honum vil eg ikki vera saman við*

*(Gordon Brown)*

# Ongantíð minni ísur kring Norðpólin

**Síðani mátingarnar byrjaðu, hevur ísurin kring Norðpólin ongantíð verið so lítil sum í ár, siga amerikanskir vísindamenn**

Sambært amerikonsku mátingunum var ísøkið kring Norðpólin 2,6 mió. ferkilometrar minni enn tað minsta, sum tað hevur verið í meðal tey seinastu tíggju árini.

Hinvegin ugga amerikonsku vísindamenninir seg við, at ísøkið hevur verið veksandi síðani seinasta sunnudag, og tá var økið 4,1 mió. ferkilometrar til víddar.

Amerikanski stovnurin, sum heldur eyga við ís- og kavaviðurskiftum, hevur kannað ísin kring Norðpólin síðani 1979. Hesar mátingarnar eru gjørdar við fylgisveini, men vísindin hevur eisini mátingar av ísviðurskiftunum í Alaska og Russlandi tað mesta av farnu øld.

Igor Polyakov, sum starvast á lærda háskúlanum í Alaska, sigur, at tað, vísindin hevur ongantíð sæð nakað, sum líkist tí, sum er hent tey seinastu árini. Eitt nú minkaði ísurin nógv í teimum lýggju 1930-árunum, men minni enn so líka nógv sum nú.

Igor Polyakov vísir á, at í fleiri vikur í summar kundu skip sigla ígjøgnum ta sokallaðu Útnyrðingsleiðina norðan fyri Kanada og Alaska. Soleiðis var eisini norðan fyri Russland, so í fleiri vikur var at kalla ísfrítt millum Atlantshavið og Kyrrahavið - báðar vegir, sigur hann.



*Í fleiri vikur í summar var at kalla eingin ísur ímillum Atlantshavið og Kyrrahavið*

# Mugabe elvir aftur til høvuðbrýggj

**Gordon Brown vil ikki sita í rúmi saman við Robert Mugabe, og aðrir stjórnarleiðarar ivast**

Í døgunum 8. og 9. desember verður toppfundur millum Evropa og Afrika. Tað er ES, sum skipar fyri, og fundurin verður í Lissabon.

Tann stóri spurningurin er, um forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, kemur til Lissabon ella ikki. Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, hevur boðað frá, at hann fer ikki á fundin, um Mugabe verður har. Í einari grein í blaðnum The Independent skrivar Brown,. at hann vil ikki sita saman við einum politikara, sum pínir sítt egna fólk, og sum kúgar ta politisku andstøðuna.

Danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, er eisini boðin á fundin í Lissabon. Í forsætismálaráðnum í Keypmannahavn verður sagt, at enn er støða ikki tikin til, um forsætisráðharrin fer ella ikki. Heldur ikki svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, hevur tikið støðu enn. Forsætismálaráðið í Stockholm sigur, at har vóna tey, at Mugabe verður verandi við hús.



*Gordon Brown vil ikki sita í sama høli sum Robert Mugabe*

## STUTT SAGT

### Djarvir munkar

Ein felagsskapur, sum sigur seg umboða nógvar av teinum buddhistisku munkunum í Myanmar, sigur, at minkarnir fara at halda fram við at mótmæla hernaðarstýrinum, til fólkið sleppur undan sínum líðingum. Talsmaðurin hjá munkunum sigur, at hvørki tann politiska ella tann búskaparliga skipanin í Myanmar virkar, og at hernaðarstýrið eigur at lata valdið frá sær. Í gjár gingu umleið 1300 munkar mótmælisgongu í høvuðsstaðnum Yangoon, har teir kravdu hernaðarstýrið frá.

### Friðskjól í Finnlandi

Fimm amerikanskir ríkisborgarar, tvey vaksin og trý børn, hava søkt um politiskt friðskjól í Finnlandi. Tey fimm komu til Finnlands týsdagin, men finsku myndugleikarnir eru sera varnir við upplýsingum um málið. Ein talsmaður hjá tollverkinum á flogvøllinum í Helsingfors hevur tó sagt, at Finnland metir USA sum eitt trygt land, og at amerikanararnir tí neyvan kunnu fáa politiskt friðskjól. Tey seinastu árini eru nógvir amerikanarar rýmdir úr USA fyri at sleppa undan at gera hertænastu í Irak. Serliga nógvir hava leitað sær skjól í Kanada.

### Skjótt at ferðast

Evropeiska snartokið Eurostar setti nýtt met í gjár, tá tað brúkti ein tíma og 43 minuttir um tann 232 kilometrar langa teinin frá London til Bruxelles. Tað er 20 minuttir skjótari enn tað gamla metið. Eurostarsnartok hava koyrt millum London og Bruxelles, síðani undirsjóvartunnilin undir Ermasundi bleiv tikin í nýtslu í 1994. Tað er kortini ikki fyrr enn nú, at tokið kann koyra við fullari ferð, tí bretska jarnbreytarkervið hevur ikki verið egnað til slík snartok fyrr enn nú.